


# Meyla stjóri í SMS í morgin...

*Tíðindaskriv*

Í morgin, fríggjadagin, hava handlarnir í SMS opið líka til kl. 23 – og hava nógv góð tilboð við nógvum avslátri bæði fríggjadagin og leygardagin – við upp til 50% í avsláttri.

- Umframt mongu tilboðini fáa vit vitjan av Lort í býnum. Millum klokkan 17 – 21 verður Meyla stjóri í SMS, og tað verður stuttligt. Hon hevur nevnliga boðið dansigentunum og klovninum JoJo at hjálpa sær, skrivar SMS í tíðindaskrivi.

Frá klokkan 17 og hvønn heilan tíma til klokkan 20 verður hon at síggja ymsastaðni í SMS. Hon fer at sita við kassan í Miklagarði, gera ísar í Horninum, servera burgarar í Burger King og kaffi í Baresso, og hon syngur og dansar í SMS. Eisini undirheldur klovnurin JoJo børnum og vaksnum.

Millum klokkan 17 – 21 ber eisini til hjá børnum at seta hárið sum Meyla – púra ókeypis. Tað er bara at fara inn á salong McGavin á svalanum.

Livandi dansigenturnar síkja seg at dansa í vindeygum í ymsum handlum og SMS, og tú kanst vita, um tú fær eyga á tær.

Meyla signerar eisini Lort í Býin fløguna í Expert millum klokkan 19.30-20.

Jens Marni og Guðrið Hansdóttir spæla í Baresso kl. 20, 21 og 22.

Børnini fáa ókeypis ballónir allan dagin.



*Meyla fer at seta sín serliga dám á SMS í morgin, tá opið verður til kl 23*


# Heilsurenningin 2008

Leygardagin 12. apríl 2008




**Heilsurenningin verður leygardagin 12. apríl kl. 16.00**

**Bólkarnir eru hesir:**
Gentur/Dreingir f. 2002 ella seinni
Gentur/Dreingir f. 1999-2001
Gentur/Dreingir f. 1996-1998
Kvinnur/Menn f. 1963-1995
Kvinnur/Menn vet. f. 1962 ella fyrr

**Heiðursmerki verða latin til 3 tey bestu í hvørjum bólki.**

*Tilmelding kann gerast á málinum ein tíma undan sjálvari renningini*

Føroya Shell